J.nr.: F.K. 00-04-
Dato:29. juni 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# FUNDARFRÁSØGN

## frá býráðsfundi nr. 09 /2006

Ár 2006 tann 29. juni kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. juni 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Signar á Brúnni, kom kl. 17,00, og var ikki við til mál nr. 34.
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen
Gordon M. Petersen
Margretha Rasmussen

Jann Toftegaard og Dánjal Vang eru staddir uttanlands í kommunalum arbeiðsørindum. Báðir hava heitt á borgarstjóran um at innkalla varalimirnar, sum ávikavist eru Margretha Rasmussen og Gordon M. Petersen, og hevur borgarstjórin gjørt eftir áheitanini.

Býráðið samtykti einmælt, at Margretha Rasmussen og Gordon M. Petersen taka sæti fyri ávikavist Jann Toftegaard og Dánjal Vang.

Býráðsskrivarin er somuleiðis staddur uttanlands í arbeiðsørindum saman við omanfyri nevndu limum í mentamálanevndini.

Skrivari: Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari

**Mál nr. 34/2006.**

**2. viðgerð av broytan av Kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu sambandi við føstum samsýningum til nevndarlimir og nevndarformenn.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu fyrisitingini, dagfest 21. mei 2006 um fastar samsýningar til nevndarlimir og nevndarformenn í føstu nevndum býráðsins, teknisku nevndini, havnanevndini, sosialu nevndini og mentamálanevndini.

Sambært skrivinum, sum byggir á kunngerð nr. 14 frá 15. mars 2006 um samsýningar vm. sambært kommunustýrislógini verður árligu samsýningarnar tilsamans kr. 178.176,00 útgreinað soleiðis, at samsýningarnar til nevndarlimir verður kr. 111.360,00 og til nevndarformenn kr. 66.816,00.

Henda upphædd er áleið tann sama, sum útgoldin varð í 2005, har nevndarlimirnir vórðu avroknaðir við vanligari fundarsamsýning.

Fyrisitingin mælir fíggjarnevndini til at heita á býráðið um at seta skipanina um fastar samsýningar til nevndarlimir og nevndarformenn í føstu nevndunum í gildi frá 1. juli 2006 at rokna, og at avrokningin fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni 2006 verður framd sum undanfarin ár fyri hvønn nevndarfundin sær eftir § 2, stk. 2, og at henda skipan fer úr gildi samstundis sum nýggja tekur við.

Somuleiðis verður neyðugt at broyta § 33, stk. 10 og 11 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, sum fastar samsýningar til nevndarlimir og nevndarformenn vm.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 26. mei 2006, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá fyrisitingini um, at fastar árligar samsýningar til nevndarformenn og nevndarlimir verða settar í gildi frá 1. juli 2006 at rokna, og at kommunustýrisskipanin § 33, 10. og 11. petti verður broytt til § 34, 10. og 11. petti.

Somuleiðis mælir nevndin býráðnum til at broyta § 20 í kommunuskipanini soleiðis:

***Hesar føstu nevndir umframt fíggjarnevndina skulu verða valdar:***

1. Tekniska nevndin
2. Mentamálanevndin
3. Havnanevndin
4. Sosiala nevndin

Ráðgevandi Heilsu- og umhvørvisnevndin og Hellunevndin verða fluttar frá § 20, 5 og 6, til 6. part "Aðrar nevndir" undir ávikavist § 28 og 29, meðan nýggj § 33 verður sett inn við heitinum "Ferðslunevndin"

Vísandi til 8. part "Broytingar í stýrisskipanini o.a. § 34, skulu broytingar verða viðgjørdar á tveimum býráðsfundum við minst 14 daga millumbili.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 01. juni 2006, og varð tilmælið frá fíggjarnevndini samtykt, somuleiðis sum málið um broytan av kommunustýrissamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu varð beind til 2. viðgerð á býráðsfundi tann 29. mei 2006. (6 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**Avgerð:**
Málið hevur verið til 2. viðgerð á býráðsfundi tann 29. juni 2006, og varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 1 ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen.

## Mál nr. 35/2006.

### Upprit til støðutakan um fígging av fótbóltshøll í Skálafirði.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið upprit frá SP/F Virkisráðgeving, dagfest 25. mei 2006, hvar greitt verður frá, at arbeiðið við at byggja eina felags fótbóltshøll í Skálabotni r komið so væl áleiðis, at FSF hevur givið tilsøgn um UEFA Hattrick stuðul til høllina upp á kr. 12,5 mió.

Fyri ar arbeiðið við verkætlanini kann koma víðari etr neyðugt at fáa eina tilsøgn frá kommununum um fígging avf ætlanini, somuleiðis sum neyðugt er, at kommunurnar hava givið sína tilsøgn áðrenn 1. august 2006.

Heitt verður í skrivinum á kommununa um at taka støðu til íløguna sambært talvu í seinasta lagi 1. juli 2006. Parturin hjá kommununi er útgreinaður soleiðis, grundað á eina kommunala íløgu upp á kr. 16,6 mió. Okkara partur svarar til 9,40%.

| Kommuna: | Íløga: | Yvir 4 ár | Yvir 6 ár | Yvir 8 ár | Yvir 15 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| Fuglafjarðar | 1.560.000 | 390.100 | 260.067 | 195.050 | 104.027 |

*Støðutakanin verður til fylgjandi:*

1. At Fuglafjarðar kommuna játtar at fíggja sín part av íløguni sambært talvuni.
2. At Fuglafjarðar kommuna tekur støðu til, hvussu nógv ár íløgan verður framd Yvir. Møguleiki er fyri, at íløgan verður goldin beinanvegin ella fíggjað yvir 15 ár.
3. At Fuglafjarðar kommuna tekur undir við at gjalda eitt byrjunargjald á kr. 70,00 pr. íbúgva, sum nýtt verður til at stovna vinnurekandi grunnin, sum Fuglafjarðar kommuna sjálvandi verður ein partur av. Byrjunargjaldið kr. 70,00 verður mótroknað samlaðu íløguni.

Til endans verður gjørt vart við, at støðutakanin til omanfyri nevndu játtan er treytað av, at allar aðrar fyritreytir, so sum bygnaðarviðurskifti, restfígging og onnur viðurskifti, ið hava týdning fyri at realisera verkætlanina, eru fingin upp á pláss. Byrjanargjaldið kr. 70,00 pr. íbúgva ella fyri okkara part kr. 109.900,00 er ætlað til arbeiðið við projektum frameftir.

Hjálagt er uppskot til stovningarsamtykt og viðtøkur fyri grunnin "Framsýningar- og fótbóltshøll".

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 19. juni 2006, og mælir nevndin býráðnum/fíggjarnevndini til, at kommunan verður partur av íløguni í fótbóltshøllini í Skálafirði, treytað av at allar kommunur verða við. Somuleiðis verður mælt fíggjarnevndini til, at samlaða íløga kommununar upp á kr. 1.560.000,00 verður fíggjað yvir 15 ár við kr. 104.027,00 um árið, og at byrjunargjald á kr. 70,00 pr. íbúgva ella kr. 109.900,00 verður nýtt til at stovna vinnurekandi grunnin, og at hetta verður mótroknað samlaðu íløguni.

Málið hevur somuleiðis verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 21. juni 2006, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini frá 19. juni h.á.

Við tað at eingin peningur er avsettur á fíggjarætlan kommununar fyri 2006 til endamálið, so mælir nevndin býráðnum til, at um so verður, at allar kommunur taka undir við ætlanini og byrjunargjaldið upp á kr. 109.900,00 møguliga kemur at falla til gjaldingar í inniverandi fíggjarári, so verður ein møgulig áheitan um eykajáttan ella umflyting millum konti og/ella kontobólkar send býráðnum seinni í ár.

**Avgerð:**
**Tilmælið frá Mentamálanevndini frá 19. juni 2006 og hjá Fíggjarnevndini frá 21. juni 2006 var samtykt við 6 atkvøðum fyri og 2 ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen.**

## Mál nr. 36/2006.

**Viðvíkjandi samstarvsavtalu við Mentamálaráðið um undirvísingarportal.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Kommunusamskipan Føroya, dagfest 16. juni 2006, hvar greitt verður frá, at KSF og FKF hava gjørt uppskot til sáttmála við mentamálaráðið um ein undirvísingarportal, sum verður stovnaður undir leiðslu av Føroya skúlabókagrunni, og sum kommunurnar í kommunufelagsskapunum fíggja saman við Mentamálaráðnum.

Gjaldið hjá kommununum verður kr. 500.000,00 árliga fyrstu ferð 1. august 2006 og síðan somu upphædd aftur tríggjar ferðir hvønn 1. januar frá 2007 til 2009. Landsins partur verður tríggjar ferðir kr. 1.000.000,00, goldið hvønn 1. januar frá 2007 til 2009.

Eftir uppskotinum til avtalu skal portalurin verða í eini royndartíð frá 1. august 2006 til 31. juli 2009. Síðan skal skipanin og avtalan endaliga eftirmetast fyri at vita, um tær eiga at halda fram eftir sama leisti eftir 31. juli 2009.

Stýrið í KSF hevur viðgjørt málið á fundum 9. mei og 29. mei 2006, har undirtøka var fyri at fara inn í samstarvið.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 19. juni 2006, og mælir nevndin býráðnum/fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi avtalu við gildiskomu 1. august 2006, sum fyri okkara part kemur at kosta umleið kr. 16.500,00 árliga.

Tó skal nevndin gera fíggjarnevndini vara við, at eingin upphædd er avsett á fíggjarætlan kommununar fyri 2006 undir "Skúlamalum" til portalin, so neyðugt verður at fáa upphæddina til vega antin við umflytingum ella við eykajáttan.

Málið hevur somuleiðis verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 21. juni 2006, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini frá 19. juni h.á., og at upphæddin kr. 16.500,00 verður avsett á fíggjarætlanum kommununar fyri 2007, 2008 og 2009, meðan gjaldið fyri 2006 verður fingið til vega innan fyri verandi játtan á økinum "Skúla- og mentamál".

**Avgerð:**
**Tilmælið frá Mentamálanevndini frá 19. juni 2006 og hjá Fíggjarnevndini frá 21. juni 2006 var samtykt við 8 atkvøðum fyri, og 0 ímóti.**

## Mál nr. 37/2006.

**Mál viðvíkjandi broytan av byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og Kambsdal.**

Á býráðsfundi tann 23. februar 2006 varð samtykt at gera niðanfyri standandi broytingar í ásetingarnar í byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu:
Sambært uppskotinum verða ásetingarnar fyri "Havna- og miðstaðarøkið" øki G broyttar soleiðis, at hetta lutvíst kann verða nýtt til bústaðir. Verandi frílendi millum Mirmansveg og Stovugerði verður broytt til bústaðarøki, og ásetingarnar fyri økið til almennar stovnar økið E kemur eisini at umfata spælipláss.

Tá ið kærufreistin var úti, var eitt mótmæli innkomið, sum er frá Kjartani Madsen á Kambsdali.

Viðmerkingar til kæruna eru hesar: "Í sambandi við virksemi í Skótahúsinum varð miðskeiðis í sekstiárunum gjørdur fótbóltsvøllur soleiðis, at børn, sum komu á legu, høvdu møguleika fyri at íðka ávísar ítróttargreinar.

Umframt virksemi hjá skótunum, so verður skótahúsið ídag eisini nýtt sum Frítíðarskúli, og er hetta fult í tráð við byggisamtyktina økið E- Í hesum sambandi er avgerð tikin um at leggja graslíki á vøllin, somuleiðis sum eisini er neyðugt at betra um annað uttandura virksemi hjá børnunum.

Eisini er ætlan um at gera sparkivøll við Fuglafjarðar skúla, sum eisini er á øki E. Fyri at henda íløga og disponering á økinum kann verða til fulla nyttu, er neyðugt, at hesir vallir kunnu verða nýttir sum alment spælipláss.

Vísandi til niðurstøðuna hjá innlendismálaráðnum í skrivi til kommununa, dagfest 09. mars 2005 kann sambært verandi byggisamtykt tílíkt virksemi bert vera á "øki F". Hetta hevur býráðið tikið til eftirtektar og gerð neyðugar broytingar í ásetingunum, so eingin ivi er um, at sparkivøllur og spælipláss eisini kann verða gjørt á økið E.

Nevndin samtykti tí, at læran ikki verður gingin á møti.

Hjálagt eru eisini undirskriftir frá borgarum hsum viðvíkjandi.

**Avgerð:**
**Málið samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti**

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18,30

Signar á Brúnni
Torfríður Abrahamsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Petur Abrahamsen
Gordon M. Petersen
Margretha Rasmussen
Sigurð S. Simonsen